gult14 cyan14 magenta14 svart14

Eingin skúlagongd á Trøðni

Skúlastjórin og skúlaleiðarin hava í felag tikið avgerð um, at skúlin á Trøðni skal lata aftur, tí skúlin verður ikki vaskaður. Nógv viðbrekin børn eru á skúlanum, og av heilsuávum ber als ikki til at hava tey á skúlanum

VERKFALL
Stefan í Skorini

Mikudagin var eingin skúlagongd á sernámsdeplinum ella skúlanum á Trøðni, sum hann eisini verður nevndur. Orsøkin er, at vaskikonurnar hava lagt arbeiðið frá sær.

– Tað eru viðbrekin børn vit hava við at gera, og av trygdarorsøkum halda vit tað vera best, at skúlin letur aftur, sigur Hans Eli Dahl, skúlastjóri, ið leggur dent á, at fleiri av børnunum eru veik, og lítið skal til, áðrenn tey gerast sjúk.

Smittuvandi er sostatt orsøkin til, at skúlin á Trøðni ikki hevur nakra skúlagongd. Hans Eli Dahl væntar ikki, at skúlin letur uppaftur, fyrr enn vaskikonurnar fara aftur til arbeiðis.

Kemur illa við

Tað kemur ógvuliga illa við hjá fleiri foreldrum at børnum, ið dagliga ganga á skúlanum á Trøðni, at hann nú er latin aftur.

Eingin skúlagongd var á skúlanum á Trøðni mikudagin, tí eingin vaskar skúlan. Tað er ein dyggur smeitur, metir skúlastjórin

Hans Eli Dahl sigur, at hetta er ein dyggur smeitur hjá skúlanum og foreldrunum at næmingunum.

– Í okkara føri er tað ikki sum á einum vanligum skúla. Børnini koma ymsastaðni frá úr landinum, og tey hava ikki eina beina leið til hús. Harumframt eru fleiri teirra óhjálpin.

Foreldrini mugu so finna eina loysn heima við hús, hvussu tey skulu leggja alt til rættis undir broyttum umstøðum.

Av tí at fleiri av børnunum á skúlanum eru ógvuliga óhjálpin, ber heldur ikki til at fáa ein og hvønn tilvildarligan persón at taka sær av teimum.

Barnagarðurin á Velbastað 10 ár

Í stórfingnum umhvørvi og góðum veðri hátíðarhildu stór sum smá í Kirkjubøar sókn í farnu viku, at 10 ár eru liðin, síðani barnagarðurin varð tikin í nýtslu

FØÐINGARDAGUR

Veðrið kundi ikki verið betri hósdagin í farnu viku, tá ið barnagarðurin í Velbastað hátíðarhelt 10 ára føðingardag sín. Bláur himmal, lýtt og eitt lítið lot. Alt, ið bendi á, at børnini, og tey, ið komu í føðingardag, fóru at fáa ein rimmar dag. Og so var. Stór lagkøka, bollar, pylsubreyð og annað gott varð borðreitt úti og inni, meðan fólk nutu løtuna.

Á dett hurlumhey í dag, halda Lea, Ninna og Guðrið

Listaframsýning

Nógvar dagar undan hátíðardegnum høvdu børn í Nýggjustovu fyrireikað dagin saman við starvsfólkunum har. Børnini høvdu fingið boð um ikki at siga nakað heima, um hvat var á skránni. Nógv hevur staðið á teimum, skilst, tí spent hava tey verið. Og ovfarin vóru tí øll, tá ið tey sóu, hvat børnini høvdu gjørt og evnað. Tveir veggir á tremur við tekningum og málningum, umframt lutir, sum børnini hava evnað burtur úr ymiskum, tey hava funnið. Og hvar finna børnini í sóknini íblástur til síni listaverk? Uttanfyri sjálvsagt. Í stórfingnu náttúruni, sum umgirðir barnagarðin. Har og í fjørðuni hava tey funnið alskyns lutir. Tað onnur hava vrakað, hava børnini sæð listina í.

Nógv broytt

Hesi 10 árini síðani barnagarðurin lat upp, er nógv vatn runnið í ánni. Eingin hevði fyri 10 árum síðani roknað við, at stovnurin fór at verða fullsettur í dag. Í hesi barnaríku sóknini ganga ikki færri enn 40 børn í vøggustovu og barnagarði. Og í løtuni standa nøkur børn á bíðilista. Eingin kemur tó at bíða líka leingi, sum tey bíða hinumegin fjallið - í Tórshavnar kommunu. . .

Fyrst í árinum tók barnagarðurin eina nýggja stovu, Nýggjastova kallað, í nýtslu. Her halda tey størstu børnini til, og tað dámar teimum sera væl.

Bara hugflogið setir markið. Her hava børnini í Nýggjustovu evna burtur úr ymiskum, tey hava funnið úti í náttúruni

Yrkisfelagið skrivað undir

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
Stefan í Skorini

Mánakvøldið skrivaðu Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara og Fíggjarmálastýriðundir semju. Sáttmálin hevur gildi til 1. oktober 2003, og tað er 2 ár og 7 mánaðir.

Lønarhækkingin er í miðal 12% í sáttmálaskeiðnum, og harumframt eru gjørdar smærri tillagingar í sáttmálanum. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, er væl nøgdur við semjuna.

Arbeiðstíðin skal skipast í rúmari karmum fyri at skapa møguleikar fyri menning og fjølbroyttum undirvísingarligum virksemi.

Farið verður eisini undir at fyrireika eina ársverksskipan og miðað verður eftir at seta hana í verk 1. august 2002.

Avtala er gjørd um at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu.

Bónus hevur latið hurðarnar upp

Ein errin Niels Mortensen, stjóri, avmyndaður í fruktdeildini í teimum nýggju hølunum á Óðinshædd, har Bónus framyvir fer at halda til. Nú er betri pláss í handlinum og til parkering, sum kundarnir fara at merkja
Mynd: Jens Kr. Vang

gult15 cyan15 magenta15 svart15

Bilar

Nr. 93 • hósdagur • 17. mai 2001 • 75. árgangur

At Carlo Petersen var tann fyrsti í Føroyum sum fekk sær sproytukabinu fyrst í sjeytiárunum, stóð millum annað at lesa í informatiónsblaðnum "Spies Hecker Journal" nr.1/99. Carlo hevði ein tann best útgjørda plátu og lakkeringsverkstaðin tá í tíðini

Upploysingarevnini í lakkinum til bilar skerjast við 60%

Sámal Olsen av Toftum hevur lakkgoymsluna hjá P/F Poul Hansen um hendur
Mynd: Jens K. Vang

Nógv er hent innan upprætting og lakkering av bilum, síðan Frits Jensen byrjaði í Rættará stutt eftir kríggið. Krøvini um at billakkið skal verða umhvørvisvinarligt eru nú vorðin sera strong

BILAR
Magnus Gunnarsson

Fyrstu árini eftir kríggið og fram til síðst í 60-árunum, vóru bilar lakkeraðir við celluloselakki. Tá í tíðini varð ikki hugsað so nógv um umhvørvið, hvørki um lufteitran ella tað sum bleiv anda niður í lunguni. Inni á bilverkstøðunum bleivu buglur rættaðar út, spartlað, pussað og sproyta, alt í sama rúmið, mitt í øllum støvrokinum. Eftir at ein bilur varð liðugt sproytaður við celluloselakkinum, var hann heilt mattur, og máttu tí slípast við slípimassa til hann fekk fullan glans.

Krøvini herd

Seinni kom syntetiska lakkið sum bleiv sproyta við glansi, men uttan herdara, og hevði tískil leingi um at torna. Kvaliteturin bleiv ongantíð heilt góður, fyrr enn akryllakkið við herdara kom. Eisini kom 2 lags-lakkið, har klárlakk verður sproyta uttaná metallic-forlakkið. Við tíðini eru krøvini til umhvørvið herd munandi, og nógvar royndir hava verið gjørdar á lakkverksmiðjunum fyri at fáa lakkið umhvørvisvinarligt. Hetta hevur ikki verið uttan trupulleikar, og á fleiri bilmerkjum hevur fabrikslakkið ikki vart bilin nóg væl ímóti rusti. Men nú sær tað út til at fabrikslakkið er blivið meira umhvørvisvinarligt og kvaliteturin er í ordan. Í dag læra fólk til plátusmiðir og bilmálarar.

Fyrsta sproytukabinan

Fyrsta sproytukabinan í landinum varð sett upp fyrst í sjeytiárunum, á upprættingar og lakkeringsverkstaðnum hjá Carlo Petersen í Torfinnsagøtu. Carlo Petersen var tann fyrsti at umboðað týska Spies Hecker lakkið, ið verður umboðað av donsku fyritøkuni, Baden Jensen. Eisini var hann ein av teimum fyrstu at fáa sær anlegg til at blanda lakkið eftir fyriskrivaðum reseptum. Annars sendi Baden Jensen sínar vørur beinleiðis til kundarnar í Føroyum, fram til 1992, tá P/F Poul Hansen Heilsøla fekk umboðið fyri Spies Hecker framleiðsluna.

P/F Poul Hansen

Ein grund til at P/F Poul Hansen fekk umboðið, var at teir ikki vóru kappingarneytar hjá bilverkstøðunum sum vóru kundarnir hjá Baden Jensen í Danmark. Teir leverað nú alla Spies Hecker framleiðsluna til upprætting og lakkering, bæði í smá og heilsølu. Spies Hecker eru longu klárir við High Solid og Very High Solid tøknifrøðini, sum lúka øll tey strongu krøvini sum koma í gildi í 2007. Tá skulu upploysningarevnini í lakkinum verða skerd við 60 prosentum.

Í november 1996 vóru fleiri føroyingar á praktiskum og teoretiskum skeiði á tekniska skúlanum í Silkeborg innan lakk hjá Spies Hecker. Mennirnir eru frá vinstru: Karl Sofus í Heimistovu Klaksvík, Uni Svabo Joensen Miðvágur, Sámal Olsen Toftir, Erling Davidsen Leynar, Niels Nattestad Miðvágur, Henrik Vegeberg Tórshavn, nú Álborg, Martin Venned Klaksvík, Ólavur Hansen Klaksvík, Marni Weihe Søldarfjørður, Jan Joensen Klaksvík, Gerheard Wiechert lakktøknifrøðingur, og Jørgen Ploughgaard sølumaður hjá Baden Jensen, sum hevur vitja javnan í Føroyum seinastu 16 árini.